# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Anna Olsen 90 ár

Hósdagin 8. desember fyllir Anna Olsen, Landavegur 48, 90 ár.

Anna Olsen, fødd Nystrøm tann 8. desember 1915, er dóttir Jóhannu Louisu f. Jacobsen og Jóan Símun Nystrøm. Jóhanna var av Syðradali og Jóan Símun av Húsum. Anna traðkaði sínar barnaskógvar á Húsum. Bleiv eisini konfirmerað har áðrenn húskið í 1930 flutti til Klaksvíkar har Jóan Símun hevði fingið arbeiði og fór undir at byggja teimum nýggj hús á Ziskatrøð. Anna og tvillingsbróður hennara eru næstelst av 5 systkjum, 2 beiggjar og 3 systrar. Av teimum hevur Anna nú bert systrina Julionnu Sivertsen eftir. Hon býr í Klaksvík.

Komin til Klaksvíkar sum 15 ára gomul fór Anna at tæna m.a. hjá Dávur í Gerðum. Sum 17 ára gomul fekk hon og vinkonan Frida hjá Sofusi hjá bakarnum tilboð um at koma til Íslands at tæna. Tað var á garði á Fagraskógi á Norðurlandinum. Har vóru tær einar 8 mánaðar. Afturkomin fekk hon húspláss á posthúsinum suðuri í Vági, og har var tað at hon møtti Carl Herup Olsen. Tey funnu saman og giftust 28. oktober 1942 í Klaksvík har tey búsettust. Anna fekk pláss í Kjølbrohandlinum á Stongunum og Carl fekk starv á skrivstovuni hjá Kjølbro. Tey bygdi sær hús á Gørðum, sum tey tó seldu í 1949, tá tey gjørdu av at flyta til Danmarkar. Eftir at hava búð eitt ár í Keypmannahavn 1949-50 flutti tey heimaftur, nú til Havnar, har Carl setti á stovn heilsøluna Farodane.



Saman fingu tey børnini Ólavur og Jóngerð sum eru fødd í Klaksvík og Regin, Randi og Jósvein fødd í Havn. Øll 5 eru gift og búsitandi í Havn. Síðani eru komin 13 ommubørn og 4 langommubørn.

Carl andaðist fyri góðum ári síðan 86 ára gamal, og untist teimum sostatt eitt langt lív saman. Vóru fegin at síggja børnini mennast og standa á egnum beinum og á rætta vegnum. Tey fingu nógv vinfólk sum teimum dámdi væl at hugna sær saman við bæði heima og á mongu ferðunum saman úti í verð.

Tey fyrstu árini í Havn búði familjan í ovari hæddina hjá Farodane á Tinghúsvegi 7. Fyrikomandi og gestablíð sum Anna altíð hevur verið, var heimið nógv vitjað bæði av skildfólki sunnanífrá og norðanífrá, umframt av útlendskum handilsvitjandi. Harafturat komu skrivstovufólkini hvønn dag uppá til Annu at fáa sær kaffi og heimabakaðar køkur. Hon var Carli ein sera hollur stuðul í hansara ídna arbeiði at menna Farodane, og sum í dag er ein av teimum størru fyritøkunum í býnum.

Seinni fluttu tey so í nýggj stór hús á Landavegnum, har Anna ídag býr einsamøll. Hon er tó heppin og fegin um at øll børnini við familju búgva í Havnini og javnan eru rundan um hana.

Anna er sera fitt í hondunum. Hevur ongantíð dugað at sett seg niðurat uttan stokkar ella nál í hond. Og mangt eitt snøgt plaggið hevur hon úr hondum greitt til børn og barnabørn. Anna mundi vera ein av teimum fyrstu kvinnunum í Føroyum sum fekk sær bindimaskinu, og væl lá fyri. Eisini hevur hon altíð havt stóran áhuga í tí sum grør bæði inni og ikki minst í urtagarðinum. Tað kunnu flestøll ásanna sum ganga framvið á Landavegi 48. Hóast aldurin, er Anna væl fyri. Hon er røsk og passar sjálv hús og hava.

Dagurin verður hildin saman við familjuni.

## Andlát og jarðarferðir

**Anders Mosbjerg Christensen** í Vági andaðist 4. desember á Ellisheiminum á Tvøroyri, 78 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum hósdagin kl. 17:30

Jarðarferðin verður úr Vágs kirkju fríggjadagin kl. 13.

Sungið verður úr sálmabókini.

**Hans Jacob Justesen,** Klaksvík, fer til gravar úr Betesda mikudagin kl. 13.

Tey, ið vilja minnast Hans Jacob kunnu lata Akrinum eina peningagávu. Konto í peningastovunum.

**Axel Haraldsen**, Tórshavn, ættaður úr Sørvági andaðist 5. desember, 59 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Ole Johannes Olsen,** vanliga nevndur Jóannes, ættaður úr Skopun, búsitandi í Nyker á Bornholm, andaðist 5. november í Hantsholm, 39 ára gamal.

Jarðarferðin verður leygardagin 10. desember kl. 11.00 úr kapellinum í Rønne.

---

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum,
at okkara elskaði pápi, sonur og beiggi

**Ole Johannes Olsen**

Vanliga nevndur Jóannes

Ættaður úr Skopun, búsitandi í Nyker á Bornholm,
andaðist í Hanstholm 5. november, 39 ára gamal.

Jarðarferðin verður leygardagin 10. desember
kl. 11.00 úr kapellinum í Rønne,
Sønder Allé 22, 3700 Rønne.

*Fyri tey avvarðandi*
**Børnini, mamma, pápi og systkin**

---

## Tríggjar jólakonsertir við kóri og orkestri



### GHM roynir nýggjar leiðir við jólakonsert, har Eivør Pálsdóttir luttekur

**JÓLAKONSERT**
*Tíðindaskriv*

Nú vit eru komin í jólamánaðin eru nógv, sum skipa fyri konsertum við ymsum formi og innihaldi.

Harmoniorkestrið GHM í Havn hevur vanliga nógv at takast við í desember mánaði. Tey ferðast víða at tendra jólatrø í suðurstreymoy og spæla til ymisk onnur tiltøk, sum vanliga verða fyriskipað í býnum. Ein fastur táttur hjá GHM er at spæla á jólakonsertini í Vesturkirkjuni saman við Havnar Hornorkestri og skiftandi kórum.

Í ár hevur GHM so tikið stig til sína egnu jólakonsert og hevur boðið trimum kórum, Felagskórinum Gøta /Leirvík, Vestmanna sangkóri og Tórshavnar Kamarkóri, at vera við til at framføra eina fjølbroytta skrá við jólatónleiki saman við orkestrinum. Stórt kór saman við harmoniorkestri er ikki roynt fyrr her heima, men nú GHM er vorðið so stórt harmoniorkestur, har mest sum øll ljóðførini, sum eitt tílíkt orkestur eigur at hava, eru umboðað, er hetta á fyrsta sinni møguligt.

Konsertirnar verða 3 í tali:
fríggjakvøldið 9. desember kl. 20.00 í ítróttarhøllini í Vestmanna
leygardagin 10. desember kl. 15.00 í Gøtu kirkju og
sunnudagin 11. desember kl. 16.00 í Vesturkirkjuni.

Sum nevnt, kunnu vit vænta okkum eina sera fjølbroytta konsert.

Konsertin byrjar við at hvørt kórið sær og felagskórið við øllum sangarunum, eini 80 í tali, syngur nakrar føroyskar og útlendskar jólasangir, har Eivør Pállsdóttir luttekur saman við kórinum við sínum nýggja jólalagi.

Síðani verða framførd 6 verk fyri kór og harmoniorkestur. Hetta eru fyri tað mesta kendir tónar, eitt nú Away in a Manger, ein sirpa við kendum jólasangum úr ymsum londum, verk úr kantatu hjá J.S. Bach og tað kenda lagið hjá Irwing Berlin, White Christmas.

Kór- og orkesturleiðsluna hava Heðin Kambsdal og Kári Bæk.

Atgongumerki á 50 kr. fást við dyrnar í Vestmanna ítróttarhøll. (børn undir 14 ókeypis).

Til kirkjukonsertirnar verður møguleiki at stuðla tiltakinum.

